## DAGSINS MEINING

# Eitt herðaklapp so bergmálið hoyrist

Vit kunnu ikki siga annað, enn at yvirtøkulógin og heimildarlógin fingu eitt stórt herðaklapp mikudagin, tá hoyring var í politisku- búskaparligu nevndini hjá Fólkatinginum. Og tað var ikki ein og hvør, sum gav herðaklappið. Herðaklappið kom frá serfrøðingunum í statsrætti, professarunum, Ole Espersen og Henrik Zahle.

Annar av teimum fór so langt sum at siga, at talan var um eitt politiskt og løgfrøðiligt meistaraverk. Somuleiðis varð sagt, at talan var um eitt stig á sjálvstýrisleið, og at heimildarlógin gevur føroyingum møguleikar, sum vit ikki hava við verandi heimastýrsskipan.

Óbeinleiðis eru orðini hjá serfrøðingunum eitt rós til landsstýrissamgonguna, fyri at hon hevur fingið tað burtur úr, sum hon hevur fingið, tí fram er komið, at løgmaður noyddist at góðtaka viðurskifti, m.a. donsku viðmerkingarnar til danska uppskotið, fyri í heila tikið at fáa framt hetta stigið á sjálvstýrisleið.

Vit vita, at hetta hóvar ikki øllum. Andstøðuflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin og tann tjóðveldissinnaði Miðflokkurin, hava barst ímóti. Teir hava víst á, at við heimildarlógini fluttu vit okkum aftur um tíðina við heima-stýrislógini, at Danmark hevði allan rættin, og at yvirtøkulógin var ikki annað enn ein nýggj heimastýrislóg.

Sjálvandi skal allar ivi kannast. Men Ole Espersen segði tað so gott, tá hann við Útvarpið mikukvøldið segði, at um tað kemur til skarpskeringar, so hevur Danmark ikki einkarrætt til at hava rætt.

Tað var frálíkt við hesi hoyringini. Men tá tað er sagt, skal okkara viðmerking eisini verða, at tíðin at viðgera uppskotini í Føroyum var ikki nóg góð. Hvørki hjá løgtingi, uttanríkispolitisku nevndini hjá Løgtinginum ella hjá føroysku fjølmiðlunum, sum hava fingið skotið í skógvarnar, at teir ikki umrøddu hesi lógaruppskot nóg væl og gjølliga. Miðlarnir royna eftir førimuni og orku at liva upp til sína samfelagsábyrgd, og tá teir ikki gera hetta nóg væl, skulu eisini teir taka í egnan barm. Men tá mugu vit heldur ikki gloyma umstøðurnar, sum eru galdandi, og í hesum máli eitt nú skjóta viðgerðin. So hetta er eisini nakað, sum okkara myndugleikar eiga at taka hædd fyri eina aðru ferð. At eisini teir taka í egnam barm.

Sjálvandi skuldi løgtingsnevndin givið sær ta neyðugu tíðina og kalla inn serfrøðingar á hesum øki. Tað skuldi nevndin gjørt av sínum eintingum, og ikki tí at andstøðan í nevndini ynskti tað. Tá so ein roynd varð gjørd at kalla inn Ole Espersen og Guðmund Alfreðsson lá ikki fyri. Helst tí skotbráðið var ov lítið.

Úr einum fólkaræðiligum sjónarhorni er tilgongdin ikki nóg góð. Hon gevur fólki og andstøðu høvi at seta spurnartekin arbeiðið hjá samgonguni og misteinkiligt gera landsstýrið, tí eitt mál skal skundast ígjøgnum. Serliga, tá talan er um eitt so týdningarmikið mál, sum kann klúgva føroyingar í tveir partar.

Nú skal so danska Fólkatingið samtykkja lógirnar, tá politiskt- búskaparliga nevndin er liðug at viðgera uppskotini. Vónandi gongur ikki so long tíð til, at vit fáa roynt lógirnar,og víst, at tær eru eitt framstig. Hoyringin var í øllum førum eitt herðaklapp so bergmálið hoyrdist!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkaræði Handilsskúlans

**Jon Jonsen**

*Fyrrverandi datamatikaralærari á Føroya Handilsskúla*

Handilsskúlastjórin hevur alment sagt, at handilsskúlin ikki er tað reina paradís. Vónandi er skúlin heldur ikki tað reina deyðaríki, men eitt stað har góð menniskju ráða og ikki hin versti.

Í vesturheiminum ráða vit menniskju við fólkaræði, men teir útinnandi fólkaræðisharrarnir kunnu jú halla annan vegin og teir flestu leggja seg helst eftir at halla nærri paradísinum.

Fólkaræðið á Handilsskúlanum hevur gjørt skilhaldsreglur. Ein dagin var óruddið ov nógv, helt leiðslan, og skrivaði tí til lærararnar ma. at "leiðslan hevur seinastu tíðina roynt at stramma upp reingerðina á skúlanum, her í millum minka um órudd á skúlastovunum. Sambært skilhaldsreglunum hevur leiðsla skúlans gjørt av, at øll skulu eta og drekka í høllini, og einans í høllini".

Tað er gott at leiðslan tekur sær av trupulleikum og hetta fær lærararnar sjálvandi eisini at hugsa um støðuna.

Datamatikaralærararnir, skuldu júst, tá hetta var aktuelt, fara at undirvísa á Handilsskúlanum aftur. Tað hevði ikki verið pláss fyri teimum á sjálvum skúlanum í langa tíð og teir høvdu tí húsast í kjallaranum í einum bygningi í grannalagnum. Tað var ikki nakað paradís, men teir royndu saman við teim lesandi eftir førimuni at skapa menniskjansligar umstøður, sum ma. var at hugna um við einum kaffimunni. Hetta fór ikki at bera til longur ífylgi teim skilhaldsreglum, sum eru galdandi á Handilsskúlanum.

Tað hildu datamatikaralærararnir vera spell, men sum góðir fólkaræðisstuðlar góðtaka teir galdandi reglur, men góðir fólkaræðisstuðlar taka sær eisini stundir til kritiskt at umhugsa og birta uppundir møguleikan fyri útviklingi og betran.

Tá leiðslan førir fram, at "ongin virðir hesi trivnaðarligu tiltøk, hvørki lærarar ella næmingar", fær tað datamatikaralærararnir at hugsa, at tað er nakað, sum burdi verið tikið upp í lærararáðnum. Tað er jú staðið, har lærarar kunnu koma við íkasti til fólkaræðið á skúlanum.

Skrivað varð tí til lærararnar á skúlanum:

*Kære Kolleger,*

*Jeg noterer mig "Sambært skilhaldsreglunum", at "ongin virðir hesi trivnaðarligu tiltøk, hvørki lærarar ella næmingar".*

*Så er det da vist et rigtigt godt spørgsmål, om det er skilhaldsreglunum ella lærarar og næmingar, som det er galt med.*

*Burde det ikke på dagsordenen til det kommende Lærararáðsfundur ?*

*Andre steder i verden gør man noget for at finde mere tidsvarende og demokratiske organisationsformer på uddannelsesinstitutioner. Jeg citerer lidt tilfældigt fundet på nettet:*

*Over the past three years, MIT has begun to adopt a new way of making decisions--one that fosters experiential learning of leadership skills and promotes a sense of community among graduate students. While graduate students at many of our peer institutions have moved toward unionization, MIT has embraced the ideals of shared governance and collaborative decision-making. The Institute has not fully realized these ideals, but it has made progress on the graduate level--and the results have been overwhelmingly positive.*

*... students have proven that, if given an opportunity, they can bring a level of professionalism, dedication, and creative thought to the table that can result in better solutions to campus problems. They have also proven the value of collaborative decision-making, which involves students in its early stages, rather than leaving them to react after decisions are made. ...*

*The MIT model of shared governance puts us far ahead of the curve. We must continue to place value on the principles essential to effective collaboration--inclusiveness, communication, transparency, and accountability.*

*Er der ikke noget med, at vi skal være blandt de fremmeste i 2015? Det gælder vel også vores skoler?*

*hilsen Jon*

Íkastið fær beinanvegin eina positiva móttøku frá lærararáðnum, men datamatikaralærararnir fáa henda teldupost sendandi í teirra felags postkassa dagin eftir:

*Til Jon,*

*Eg havi fingið sendandi ein t-post, sum tú hevur sent til tínar starvsfelagar á FH, sum reaktión uppá órudd á skúlastovunum. Fyri tað fyrsta uppførir tú teg óprofessionelt og illoyalt, við ikki at senda mær ein slíkan teldupost - tú handlar sjálvur beint í móti tí, sum tú sjálvur mælir øðrum til. Tú hevur ongantíð verið leiðari hjá starvsfólkum etc. so tú veit eftir mínari meting ikki, hvat leiðsla er fyri nakað - annað enn í teori og dreymum - tú ert lukkuliga óvitan um leiðslu.*

*Eg leggi til merkis, at tú roynir at brúka (ella misbrúkar) úttalilsir frá øðrum skúlum ella teoretikarum um skúlaleiðslu, men eg gangi út frá, at allir skúlar í verðini ikki hava sama útgangsstøði etc. sum FH og tí ber ikki til at generalisera sum tú ger. Eg havi opnað upp fyri kommunikatión og samstarvi á FH seinastu 2 árini - hvussu ber tað til, at tú hevur verið púra ókendur her á skúlanum í eini 5 ár og ikki fyrr enn heilt nýliga mátti eg invitera teg til at kunna um TSÙ á einum lærararáðsfundi (hvem er dine kollegaer?).*

*Næmingaráðið, lærarar; MMR og onnur starvsfólk hava verið við í tilgongdini at gera hesar skildhaldsreglur, men tær avtalur sum gjørdar eru, verða heilt einfal ikki hildnar ella virdar. Tú varð biðin um at hjálpa til at orða ein kt-politik saman við kt-bólkinum - tú bidróg ikki við nøkrum, annað enn snik, snak. Eg ælti mær ikki at ganga runt og spæla stuðulspædagogur fyri lærarar ella næmingar og eg ætli mær heldur ikki at verða uppalari fyri vaksin fólk.*

*Um so er, at tú heldur teg hava skil fyri skúlaleiðslu eigur tú at hava so mikið av persónligum dirvi, at tú sendir slíkar tendensiøsar og ákærandi viðmerkingar til mín - tú uppførir teg luskut og hevur eina heilt aðra missión við tínum viðmerkngum.*

*Reidar*

Hetta er veruliga nakað, sum krevur sítt fyri at fáa sodnað. Tað merkir lesarin kanska eisini. Lesarin kann so sjálvur meta um, hvar á skalanum millum paradís og deyðaríkið fólkaræði Handilsskúlans hoyrir heima.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.